# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Nysted Simonsen, Hvannasund,** andaðist á Norðoya Røktarheimi týsdagin, 78 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hóskvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður úr Hvannasunds kirkju fríggjadagin kl. 14.

**Dagurin**
**18. juni. Leontius**, deyður umleið ár 135. Heryvirmaður í rómverska herinum, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*




# »Nýtt úr Havn« í Smiðjuni



*Kári Svensson hevur listaframsýning í Smiðjuni í sambandi við Tórsfagnaðin*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Í sambandi við Tórsfagnaðin í Havn letur listamaðurin Kári Svensson upp framsýningina “Nýtt úr Havn” í Smiðjuni í Lítluvík leygardagin kl. 11.30.

Talan er um eina framsýning við 17 oljumálningum á lørift og 15 oljukritsskitsum á pappíri.

Myndevnini eru ein ferð gjøgnum Havnina, sigur Kári, sum sigur seg vera havnarmann við stóra H, hóast hann dagliga arbeiðir í sínum atelieri á Velbastað, har hann stórtrívist.

Framsýningin verður opin til kl. 20 leygarkvøldið. Annars verður hon eisini opin sunnudagin, mánadagin og týsdagin, allar dagar frá kl 14-18.

*-red*

# Forever í Kvívík

Í dag hósdagin 18. juni lata Beinta og Rannvá Isaksen upp ein nýggjan handil í Kvívík. Talan er um handilin »Forever«, sum selur alskyns prýði.

Beinta og Rannvá – sum báðar eru giftar Isaksen, av tí at menninir hjá teimum eru brøður – lata í dag handil upp nýggjum hølum á Víkarvegi 33 í Kvívík.

Handilin sjálvur hevur verið til í eini tvey ár, tá tær sjálvar byrjaðu at fara runt at selja. Seinastu tríggjar mánaðirnar hevur handilin somuleiðis verið at finna á netinum og í dag verður fysiski handilin so latin upp.

Men so er spurningurin, hví tær báðar lata handil upp í Kvívík. Vit skuldu vera onkustaðni, og vit búgva í Kvívík, har tað er munandi bíligari enn at hava handilin í Havn, sigur Rannvá Isaksen. Hon leggur afturat, at tær hava góðar vónir, hóast sølan ikki er so góð í løtuni, sum hon onkuntíð hevur verið. Samstundis, sum hon staðfestir, at handilin ikki verður opin hvønn dag, men at kundar altíð kunnu røkka handlinum.

Vørurnar hjá handlinum verða gjørdar í eysturlondum, men verða innfluttar úr Danmark.

Á netinum er handilin at finna á 4ever.fo

Hósdagin og fríggjadagin er handilin opin frá kl. 14-20, og leygardagin er opið frá kl. 10-16.

Umframt hesar tíðir ber til at ringja á tel. 211677 ella 721890.

*-red*



*Rannvá Isaksen í nýggja handlinum Forever í Kvívík*